


*Lætt er at hava samband við tey kæru heima í Føroyum. Eyðun Petersen hyggur eftir eini mynd, hann hevur fingið sendandi umvegis telduna. Á telduskíggjanum sæst ommusystir Eyðun, Anna á Roykheyggi, sum situr undir Martu, dóttrini hjá Oddfríði Gaardbo, sum er svágur Eyðun*

# Dagligt lív á Melkøya

**Á Melkøya verður arbeitt 12 tímar um dagin sjey dagar um vikuna. Farið verður til arbeiðis kl. 6:30 og endar arbeiðsdagurin kl. 18:30, tá ein heit máltíð verður etin. Tá menninir umsíðir hava eina fríløtu eru nógvir møguleikar at stytta sær stundir við, til dømis lesistova, sjónvarpsstova, fitnessrúm og telducafe.**
**Teir eru á Melkøya í 14 dagar og hava síðani frí í 21 dagar.**



*Matsteðgur er á arbeiðsplássinum – vinstrumegin Per Holm Andersen, ein dani og aftanfyri Dánjal Jákup í Brekkunum úr Hósvík og aðrir føroyingar*



*Hvønn leygardag eta teir eina betri máltíð á arbeiðsplássinum – vinstrumegin: Jóhannus á Rógvu úr Vestmanna, Rúni Mortensen úr Sundalagnum, Gisli Poulsen úr Havn og ein norðmaður*



*Per Holm Andersen og Hans Jákup Johannesen (sum hevur tikið allar myndirnar á Melkøya) práta saman og leggja dagsins arbeiði til rættis*

Sosialurin